# NEVNDARFRÁSØGN

2022




## REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP

# Innihaldsyvirlit

Yvirlit yvir limirnar ........ 4
Um felagið ........ 5
Nevndin í RFH ........ 5
Felagið í tølum ........ 6
Shippingvinnan í Føroyum ........ 7
Starvsfólk hjá reiðaríunum í RFH ........ 7
Sáttmálasamráðingar ........ 9
Løgtingsvalið 2022 ........ 10
Valynski 1: Reiðarafelagið fyri Handilsskip: Raðfestið maritimar útbúgvingar ........ 10
Valynski 2: Reiðarafelagið fyri Handilsskip: Betri atgongd til altjóða marknaðir ........ 12
Valynski 3: Reiðarafelagið fyri Handilsskip: Beinið burtur ójavna kapping ........ 14
Føroyska flaggið ........ 15
Støðan hjá vinnuni ........ 17
Nýggj krøv til vinnuna / grøna orkuskifti ........ 17
Minka um útlátið á sjónum ........ 17
EU emissions trading system (ETS) ........ 17
Krøv um EEXI og CII ........ 17
Lógarbroytingar síðan seinast ........ 18
Felagskommunal havnareglugerð ........ 18
Kunngerð um F-gass ........ 19
Samanumtikið ........ 19

# Yvirlit yvir limirnar

Bakkafrost Farming

Bal Bulk P/F

Faroe Ship P/F

Navigare Shipping Sp/f

Samskip P/F

Sandgrevstur P/F

Silver Liner Faroe Islands Sp/f

Skansi Offshore P/F

Skipafelagið NorLines Sp/f

Smyril Line P/F

Smyril Line Agency Sp/f

SVITZER Faroe Islands P/F

Thor P/F

Thun Sp/F

# Um felagið

Reiðarafelagið fyri Handilsskip (RFH) er felag fyri reiðarar av føroyskum handilsskipum. Endamál felagsins er at savna allar reiðarar fyri føroysk handilsskip til at útinna felags áhugamál, m.a. at gera sáttmálar við feløgini fyri manningarnar á føroyskum handilsskipum eins og á øðrum økjum at verja felags áhugamál limanna. RFH er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum. Felagið hevur í dag 15 limir umboðandi 67 skip.



## Nevndin í RFH

- Jens Meinhard Rasmussen, *formaður*
- Hentzar Steingrímsson, *næstformaður*
- Gunnbjørn Joensen
- Sjúrður Johansen
- Bogi P. Nielsen
- Álvur Højgaard

## Felagið í tølum

Í RFH eru nú 15 limir, sum umboða 67 skip. Samlaða tonnagan í 2023 var 251 túsund BT í mun til 255 túsund BT í 2022.

Limirnir eru virknir innan m.a. siðbundnan farmaflutning, ferðafólkaskip og tænastuskip innan alivinnu og oljuvinnu. Harumframt fevnir shipping eisini um atknýtt virksemi á landi.

Tey flestu skipini í RFH eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS). Talið av skrásetingum í FAS er vorðið meira støðugt seinastu árini, og hetta ger seg eisini galdandi fyri limatalið í RFH.

Nevndin fegnast um, at ein stórur partur av reiðaríunum, sum hava skip í FAS, eru limir í RFH. Tað hevur stóran týdning, at vinnan stendur saman um at bera vinnugreinina fram á leið, soleiðis at hon alsamt gerst ein størri og týdningarmiklari partur av føroyskum vinnulívið.

**Mynd 1: Sjófólk í reiðaríum undir RFH, januar 2023.**




*Kelda: Reiðarafelagið fyri Handilsskip.*

# Shippingvinnan í Føroyum

Shipping fevnir um allan flutning á sjónum.

Liminir í RFH eru við til at tryggja føroyskum sjófólki fjølbroyttar starvsmøguleikar. Reiðaríini hava fleiri føroyingar í starvi, men átrokandi tørvur á arbeiðsmegi ger tað alneyðugt hjá vinnuni at hava góða atgongd til útlendsk sjófólk fyri at manna neyðugu størvini.

Shipping sum vinnugrein er umráðandi fyri føroyska búskapin. Vinnan økir um føroyska útflutningsvirðið og er við til at skapa ein fjølbroyttan arbeiðsmarknað. Somuleiðis kann shippingvinnan javna konjunktursveiggj í føroyska búskapinum, tí vinnan verður vanliga ikki ávirkað av samfelagsgongdini í Føroyum, men er meira tengd at gongdini í heimsbúskapinum. Hetta kann verða ein styrki fyri føroyska búskapin.

Ein fortreyt fyri at hava ein vælvirkandi handilsflota í Føroyum er, at ein altjóða skipaskráseting er fyri føroysku skipini, og at hendan skipanin er kappingarfør. Um FAS skipanin ikki var í Føroyum, høvdu skipini verið skrásett aðrastaðni, har slíkar skipanir eru. Hetta eru treytirnar fyri at virka í altjóða shippingvinnuni, og hesar treytir hava Føroyar lítla og onga ávirkan á. FAS skipanin skapar í dag nógv størv á sjógvi og landi, og hesi størv høvdu ikki verið í Føroyum, um skipanin ikki var.




## Starvsfólk hjá reiðaríunum í RFH

Sum stabbamyndin vísir, skapar henda vinnugrein nógv arbeiðspláss. 1. januar 2023 eru í alt 1612 starvsfólk knýtt at vinnugreinini, bæði á sjógvi og á landi. 1.304 sjófólk eru umbroð á skipum undir RFH, og 308 starvsfólk arbeiða á landi.

Talið av føroyskum sjófólki er økt 7% seinasta árið, frá 487 1. januar 2022 til 523 1. januar 2023. Talið av sjófólkum, sum ikki eru norðurlendingar, er somuleiðis økt, meðan talið av norðurlendingum stendur nøkulunda í stað. Tilsamans er talið av sjófólki økt seinasta árið við uml. 6%.

Størsta avbjóðingin ísv. manning er at finna skikkaða arbeiðsmegi til skipini. Handilsskip virka undir altjóða krøvum og reglum, sum setur strong krøv til manning. Sum dømi kann nevnast krav um fulltiknar dekkarar. Í Føroyum er avbjóðingin at finna fulltiknar dekkarar, tí fáir fulltiknir dekkarar eru her á landi. Hóast útbúgvingin er sett á stovn á Sjónámi, eru framvegis alt ov fá, sum fullfíggja lærutíðina.

Tað er tí alneyðugt hjá handilsflotanum at hava útlendsk sjófólk umborð á skipum okkara. RFH heldur, at skal handilsflotin hava bestu sømdir at virka undir er neyðugt við ávísum broytingum í lógarverkinum ísv. setan av útlendskari arbeiðsmegi. Eitt nú er neyðugt at hækka markið av atkomum í havnum, áðrenn neyðugt er við arbeiðsloyvi til útlendingar.

**Mynd 2: Sjófólk í reiðaríum undir RFH, skift á stað (sjófólk og fólk á landi), januar 2023.**




*Kelda: Reiðarafelagið fyri Handilsskip.*

**Mynd 3: Sjófólk í reiðaríum undir RFH, skift á tjóðskap, januar 2023.**




*Kelda: Reiðarafelagið fyri Handilsskip.*

# Sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir við manningarfeløgini gingu út 1. mars 2023.

RFH hevur tilsamans níggju sáttmálar við tey trý manningarfeløgini. Við hvørt felag er ein høvuðssáttmáli og tveir sersáttmálar fyri ávikavist størri og smærri skip í frálandavinnu.

Fríggjadagin 17. februar skrivaði RFH undir nýggjar tvey ára sáttmálar við Maskinmeistarafelagið og Fiskimannafelagið.

Talan var um tvey ára sáttmála, og lønin hækkar 1. mars 2023 við 3,80% og 1. mars 2024 við 4,04%. Sáttmálabroytingarnar fylgdu karminum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri samráðingarumfarið 2022-2024. Eisini samdust partarnir um, at tænastuskip til alivinnuna, sum eru skrásett í FAS, gerast partur av sáttmálanum fyri frálandavinnuna.

1. mars 2023 vóru RFH og FSN ikki komin á mál við samráðingunum um nýggjar sáttmálar.



*Jens Meinhard Rasmussen, formaður í RFH, og Tummas Eli Høj Joensen, formaður í Maskinmeistarafelagnum*



*Jens Meinhard Rasmussen, formaður í RFH, og Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag*

# Løgtingsvalið 2022

Til løgtingsvalið 2022 legði Vinnuhúsið fram nøkur valynski frá vinnuni til komandi samgonguna. RFH hevði trý valynski, sum felagið ynskti at seta á breddan, og at fáa komandi samgongu at loysa.

## Valynski 1: Reiðarafelagið fyri Handilsskip: Raðfestið maritimar útbúgvingar

*RFH hevur saknað eina raðfesting og greiða menningartilgongd av maritimum útbúgvinum í Føroyum. RFH heitir tí á komandi landsstýrið um at seta maritima útbúgvingarøkið á breddan.*

Føroyski handilsflotin hevur ein týðandi leiklut í okkara samfelag. Umleið 800 føroyingar hava sín vinnuveg innan føroyska handilsflotan, av hesum eru 500 á sjónum. Tøl frá Hagstovuni vísa, at útflutningsvirðið hjá limunum hjá RFH í 2021 var 882 mió. krónur, sum svarar til 44% av samlaða útflutninginum av tænastum.

Talan er um fjølbroytt arbeiðspláss við góðum starvsmøguleikum, fleiri vitanarstørvum og góðum møguleikum fyri nýggjum vinnumøguleikum á sjónum, har vit hava okkara siðbundnu styrki. Shipping er harafturat ein altjóða vinna, sum ikki er tengd at samfelagsgongdini í Føroyum, men gongdini í heimsbúskapinum. Hetta merkir, at stór konjunktursveiggj, sum mangan merkja føroyska búskapin, kunnu javnast í hesi vinnugreinini.

### Tillagingar til verandi útbúgvingar og regluverk

RFH heldur tað vera neyðugt at tryggja, at verandi útbúgvingartilboð eru nøktandi og samsvara tí tørvi, sum vinnan hevur.

Útbúgvingin sum skipsatstøðari er eitt dømi um, at útboð og tørvur ikki samsvara. Tilgongdin til hesa útbúgvingina hevur ikki verið nøktandi, og fráfallið hevur somuleiðis verið stórt. Men vinnuni tørvar fulltiknar dekkarar, ikki skipsatstøðarar. Hetta sæst aftur í krøvum frá Sjóvinnustýrinum til føroysk skip, har onki skip

hevur krav um at hava skipsatstøðara, men kravið er hinvegin altíð fulltikin dekkari. Tí er skynsamt at tillaga útbúgvingina til at verða fulltikin dekkari. Tá koma næmingarnir skjótari ígjøgnum útbúgvingina, og vinnan fær ta arbeiðsmegi, sum henni tørvar so dyggiliga.

## At uppstiga ávísar útbúgvingar

Í fleiri ár hevur ynski verið at uppstiga maskinmeistara- og skipsføraraútbúgvingarnar til bachelor útbúgvingar, og harvið gerast partur av almennum standardum fyri hægri útbúgvingar. Maskinmeistarar kunnu í dag taka eyka skeið á Setrinum og uppstiga til bachelor støði, men enn vantar sami møguleiki fyri skipsførarar.

## Nýggjar útbúgvingar setast á stovn

Neyðugt er at økja áhugan og vitanina hjá ungum fyri shipping og teimum starvsmøguleikum, sum henda vinnan veitir, bæði á sjógvi og á landi.

Í Sjóvinnupolitikkinum frá 2017 stendur, at neyðugt er at fáa shipping inn sum lærugrein á búskaparbreyt á miðnám, og sum maritima leið á almennu miðnámsbreytini. Somuleiðis verður víst á tørvin at skipa eitt ella tvey ára útbúgving innan logistikk og shipping á handilsskúlunum omaná miðnáms- ella yrkisútbúgvingar.

Hetta eru lærugreinar, sum vinnuni tørvar í dag, og tí heitir RFH á komandi landsstýri at taka fram aftur sjóvinnupolitikkin frá 2017 og seta tilmælini í verk.

## Reiðarafelagið fyri Handilsskip mælir til:

- at raðfesta maritimar útbúgvingar, tí handilsflotin kann bjóða fleiri fjølbroytt størv, bæði á sjógvi og á landi.
- at neyðugar broytingar, sum tryggja føroyska kappingarførið, verða framdar beinanvegin.
- at taka fram Sjóvinnupolitikkin frá 2017 og seta í verk tilmælini innan útbúgvingarøkið.









## Valynski 2: Reiðarafelagið fyri Handilsskip: Betri atgongd til altjóða marknaðir

*Ein forðing fyri vøkstri hjá føroyska handilsflotanum er vantandi tvískattaavtalur. Føroysk feløg eru snøgt sagt ikki kappingarfør til at bjóða upp á sáttmálar á fleiri marknaðum orsakað av vantandi tvískattaavtalum, samstundis sum kappingarneytar okkara eru skrásettir í londum, sum hava nógv fleiri tvískattaavtalur. Somuleiðis vanta avtalur um innanlandsflutning í londunum í Evropa. Hetta er alneyðugt at broyta skjótast gjørligt.*

Í fleiri ár hevur RFH víst á ein bráðfeingis tørv á fleiri tvískattaavtalum. Føroysk reiðarí eru kappingarfør, tá tað veldst um manning, skip og vitan, men reiðaríini missa fleiri sáttmálar, tí vantandi tvískattaavtalur gera, at føroysku feløgini og manningarnar skulu rinda skatt bæði í Føroyum og uttanlands. Harvið eru reiðaríini ikki kappingarfør.

Ítøkilig dømi eru um, at føroysk reiðarí hava fingið bíleggingar frá møguligum kundum, men orsakað av vantandi tvískattaavtalum, eru hesar farnar fyri skeyti. Eitt annað dømi eru útboð í Ísrael, sum føroysk feløg kundu bjóða uppá, men nógv størri skattaútreiðslur gera, at tað ikki er møguligt at koma inn á hendan marknaðin.

Vinnan hevur góðar vakstrarmøguleikar, men føroysk feløg eru undir serligum trýsti, tí vit hava sera fáar tvískattaavtalur í mun til tey lond, har kappingarneytarnir hava skrásett síni skip. Hetta ger, at føroysku feløgini hava trupult við at vaksa um verandi virksemi. Hetta gagnar ongum, hvørki reiðaríum, føroyska samfelagnum ella manningini.

Føroyar hava fyrr havt tvískattaavtalur við heilt nógv av heimsins londum, men hesar hava vit ikki longur. Í løtuni hava Føroyar tvískattaavtalur við norðurlondini, Bermuda, Jomfrúoyggjar og Cayman Islands, Bretland og Norðurírland, Guernsey og Jersey, India, Isle of Man og Sveis. Hetta er als ikki nøktandi í mun til tørvin hjá føroysku shippingvinnuni, og eitt komandi landsstýri eigur at leggja dent á at betra hetta.

RFH heitir á komandi landsstýri um at kanna møguleikan fyri antin at gera nýggjar tvískattaavtalur ella at gerast partur av donskum tvískattaavtalum. Vit eiga at fara undir hetta arbeiðið skjótast gjørligt og kanna fyrimunir og vansar við hesum møguleikum.

Á sama hátt sum handilsavtalur hava týdning fyri tær fyritøkur, sum útflyta vørur, hava avtalur um tvískatt og cabotagusigling stóran týdning fyri shippingvinnuna. Tí eigur landsstýrið at seta orku av til hetta arbeiðið, so komast kann munandi longri fram á leið.

## Cabotagusigling

Vinnuni tørvar eisini avtalur um innanlandsflutning, cabotagusigling, við lond á evropeiska meginlandinum. Føroyar hava bert avtalu við Norðurlond um cabotagusigling. Tí eru nógvar avmarkingar fyri, hvar skip í FAS kunnu útinna uppgávur. RFH heitir tí á komandi landsstýri um at fáa avtalur við ES, ella einstøk lond í ES, um cabotagusigling.

Okkara altjóða kappingarføri er treytað av, at okkara skip sleppa at virka undir somu reglum sum tey skip, vit kappast við, og at vit hava atgongd til somu marknaðir.

## Reiðarafelagið fyri Handilsskip mælir til, at:

- kanna møguleikarnar at gera fleiri tvískattaavtalur og avtalur um cabotagusigling, so vinnan fær betri vakstrarmøguleikar.
- farið verður ítøkiliga til verka við at lýsa fyrimunir, vansar og strategiska raðfesting av ymiskum londum.
- kannað verður, um vit skulu fara undir samráðing um egnar tvískattaavtalur, ella um vit skulu gerast partur av teimum tvískattaavtalum, sum Danmark longu hevur.



## Valynski 3: Reiðarafelagið fyri Handilsskip: Beinið burtur ójavna kapping

*RFH ynskir, at komandi landsstýri arbeiðir fyri at tryggja, at føroysk handilsskip hava javna kapping á øllum økjum. Í dag eru fleiri dømi um ójavna kapping, sum ger okkum minni kappingarfør.*

Ein góður vinnupolitikkur eigur at skipa umstøðurnar soleiðis, at kapping og kappingarføri eru drívmegin, so vinnan framleiðir størst møgulig virði fyri samfelagið. Í dag eru ávísar avbjóðingar fyri handilsskip, sum gera, at hesi mál ikki verða rokkin til fulnar. Her eigur politiski myndugleikin at fremja loysnir skjótast gjørligt.

Handilsflotin kappast á altjóða marknaðinum, og vinnan er væl regulerað undir altjóða reglum og treytum. Vit eiga tí at fylgja altjóða reglum og ikki hava serføroyskt regluverk, sum leggur eyka byrðu á føroysku handilsskipini, og harvið gevur kappingarneytum okkara fyrimunir.




Eitt dømi um serføroysk krøv eru føroysku krøvini til kokkar umborð á handilsskipum. Stórur tørvur er á arbeiðsmegi á sjónum kring allan heimin, men krøvini til kokkar hjá føroyskum handilsskipum eru strangari enn altjóða krøv. Hetta merkir, at føroysk reiðarí hava truplari at finna skikkaði starvsfólk til hetta økið í mun til onnur handilsskip. Hetta er neyðugt at broyta.

Eitt annað dømi er ójavnað kappingin um flutning millum Føroyar og Grønland. Royal Artic Line hevur monopol upp á flutning millum Grønland og útheimin, og Posta hevur gjørt avtalu við Royal Artic Line um flutning til og úr Føroyum. Privat føroysk flutningsfeløg sleppa sostatt ikki at sigla til Grønlands, samstundis sum almennu Føroyar hava gjørt avtalu við hetta felagið um fría atgongd til føroyska marknaðin at kappast við privat føroysk flutningsfeløg.

RFH vónar, at komandi landsstýri rættar slíkar skeivleikar og vil arbeiða fyri góðum og jøvnum kappingartreytum fyri føroyska handilsflotan.



# Føroyska flaggið

International Chamber of Shipping (ICS) ger hvørt ár eitt yvirlit yvir heimsins skipaskrásetingar – the Flag State Performance Table.

Avrikslistin gevur ábendingar um, hvussu teir einstøku flaggstatirnir um allan heimin standa seg. Listin greinar viðurskifti sum altjóða havnaeftirlit, ígildissetan av altjóða sáttmálum á maritima økinum, miðalaldur á handilsflotanum og luttøku á IMO fundum.

Eins og seinastu árini er føroyska altjóða skipaskráin, FAS, millum tær bestu. Talvan er bygd upp við grønum og reyðum puntum, har teir grønu vísa positivar avriksindikatorar, og teir reyðu vísa negativar avriksindikatorar.

Orsøkin til, at flaggið er merkt við reyðum undir Tokyo Mou er, at Føroyar ikki eru partur av Tokyo Mou White List, og tí verður hetta frámerkt í tabellini.

# 2022/2023 Flag State Performance Table




*Kelda: International Chamber of Shipping, 2022/2023*

# Støðan hjá vinnuni

Støðan í heiminum seinasta árið hevur stóra ávirkan á føroyska handilsflotan. Ógvuslig hækking í oljuprísum, hækkandi rentur og vaksandi inflasjón hevur merkt reiðaríini og teirra virksemi meint og ein munandi hægri kostprísur hevur lagt trýst á raksturin hjá reiðaríunum.

Frálandavinnan er tó bjartskygd um framtíðina, tí hækkingin í oljuprísinum og orkutrygdarstøðan hevur økt um virksemið og sett í gongd nýggjar og útsettar verkætlanir, umframt at útbygging av varandi orku á havinum fer at skapa nógv virksemi.

Starvsfólkatrot er enn ein stór avbjóðing í gerandisdegnum. Hóast fast-track skipanin hevur munað væl, er framhaldandi tørvur á at betra um møguleikan at fáa útlendska arbeiðsmegi.

# Nýggj krøv til vinnuna / grøna orkuskifti

Altjóða krøv til útlát hjá handilsflotanum verða munandi herd komandi árini, og handilsflotin er undir strongum krøvum frá International Maritime Organisation (IMO).

## Minka um útlátið á sjónum

Arbeitt verður við átøkum fyri at røkka málunum, sum IMO hevur sett. Málið er, at útlátið av vakstrarhúsgassum hjá handilsskipum skal minka við 40% í 2030 samanborið við 2008 og lækka við 50% í 2050 samanborið við 2008.

## EU emissions trading system (ETS)

EU ETS er ein skipan, sum avmarkar útlát hjá handilsskipum á ferðum innanfyri ES. Handilsskip yvir 5.000 BT (íroknað skip, sum ikki eru undir ES flaggi, við virksemi í ES havnum), skulu keypa loyvi til 50% útlát til bæði inn- og útsigling á altjóða túrum.

Meðan ætlanin er, at ETS fyri shippingvinnuna kemur í gildi í 2024, kemur skipanin við loyvum ikki í gildið fyrr enn í 2025. Tó er tað so, at bert 40% av staðfestum útláti fráboðað í 2024 (t.e. 20% av útláti frá altjóða ferðum uttanfyri ES) fer at krevja loyvi í 2025 (hækkandi til 70% í 2026 og 100% í 2027).

## Krøv um EEXI og CII

1. januar 2023 komu reglugerðirnar um Energy Efficiency Existing Ship Index (EEXI) og reglugerð um at lækka $CO_2$ útlátið (CII) í gildi.

Øll skip yvir 400 BT, sum koma undir Marpol Annex VI, eru fevnd av EEXI og skulu skjalprógva, at tey lúka hesi krøv.

Har EEXI hevur til endamáls at góðkenna ávísar loysnir innan sniðgeving av skipum, er CII (Carbon Intensity Index) ein árlig eftirmeting av tí veruliga CO2 útlátinum hjá tí einstaka skipinum í farna ári. Hetta eftirlit byrjar í januar 2023 og er galdandi fyri skip yvir 5000 BT.



# Lógarbroytingar síðan seinast

Eitt aðalmál hjá RFH er, at Føroyar fylgja altjóða sáttmálum innan handilsflotan. Tí verður eisini tikið undir við lógarbroytingum, sum eru ein avleiðing av føroyskari luttøku í altjóða samstarvi. Flestu lógir og kunngerðir, sum verða sendar til hoyringar, eru avleiðing av okkara altjóða skyldum, og tá hevur RFH sjáldan viðmerkingar til uppskotini.

Øll hoyringssvar hjá RFH eru annars at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum á www.industry.fo.

## Felagskommunal havnareglugerð

RFH legði í hoyringssvarinum dent á, at neyðugt er at tryggja verandi virksemi. Reiðaríini bera ótta fyri, at strongu krøvini í reglugerðini kunnu fáa neiliga ávirkan á handilsskip, tí ikki er vist, at til ber at gera allar neyðugar umleggingar innan ásettu tíðarfreistirnar, og ein orsøk kann verða, at neyðuga tøknin enn ikki er tøk.

RFH saknar harumframt, at kommunurnar gera sín part og veruliga seta gongd á abeiðið at veita landstreym. Skipini kunnu ikki vera í drift, samstundis sum allir motorar eru sløktir, og tí er neyðugt við atgongd til streym á annan hátt.

Umleggingar til landstreym taka tíð. Eitt er fyrireiking og uppseting av landstreymsanleggi, men skipini mugu somuleiðis gera umleggingar umborð fyri at kobla til landsstreymsanlegg. Tí eigur hetta arbeiðið at verða sett í gongd beinanvegin.

### Kunngerð um F-gass til hoyringar

RFH tekur fult undir við, at vit fara undir eina tilgongd at leggja um frá f-gassi fyri at lækka um útlátið. Tó er umráðandi, at hetta verður gjørt á slíkan hátt, at tað í praksis ber til at tillaga og útskifta tær omanfyri 1.000 køliskipanirnar, sum finnast á landi og umborð á skipum.

Hetta uppskotið til kunngerð fer at ávirka fleiri farma- og ferðamannaskip. Hvat hetta fer at merkja er enn óvist, tí reiðarafeløgini hava ikki havt stundir til at kanna hetta nærri, men freistin at fremja so umfatandi broytingar á skipunum er alt ov stutt. Tað skulu helst bíleggjast nýggjar køliskipanir, og tað eru langar veitingartíðir á slíkari útgerð í dag. Harumframt skulu umbyggingar helst eisini gerast umborð á skipunum. Freistin til tann 1. januar 2024 er tí alt ov stutt og helst eisini ómøgulig at ganga á møti.

# Samanumtikið

Vit fegnast um, at Handilsflotin stendur seg væl í kappingini um sjófólk, og at talið av skipum og starvsfólkum í vinnuni er støðugt. Avbjóðingarnar eru tó tær somu sum undanfarnu ár s.s. avmarkaða tilgongdin av fulltiknum dekkarum og atgongd til starvsfólk yvirhøvur.

Felagið hevur javnan víst á, at okkum tørvar betri marknaðaratgongd, um vit skulu verða kappingarfør við útlendsku kappingarneytarnar. Tí mæla vit nýggja landsstýrinum til at fara undir arbeiði at fáa fleiri tvískattaavtalur og avtalur um cabotagesigling.

Farna árið hevur verið merkt av óvissuni kring heimin. Vinnan er rakt av príshækkingum og vaksandi inflasjón, sum ger, at reiðaríini mugu umhugsa sítt virksemi gjølla.

Handilsskip virka undir altjóða krøvum, og bæði IMO og ES londini hava sett víðfevnd krøv í verk fyri at minka útlát og verja umhvørvið. Vinnan hevur sum mál at røkka hesum krøvum, og gera stórar íløgur innan menning og nýggja útgerð komandi árini.

1. mars 2023

Nevndin í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip

Jens Meinhard Rasmussen, formaður

# REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP

Adressa
Óðinshædd 7
Postboks 1038

Telefonnummar
309900

Teldupostur
jorun@industry.fo

Fartelefon
739913

Heimasíða
www.industry.fo

